

*- Her er nokk at gera, sigur Johan Andersen*

*Mynd: Høgni Thomsen*

# Ein beding fyri allar bátar

**Andersen Beding á Strondum hevur nógv ár á baki. - Vit hava í roynd og veru eitt sera víttfevnt tilboð til bátaeigarar, sigur arbeiðsformaðurin, Johan Andersen**

SKIPASMÍÐ

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Strendur:** At tað veruliga er so sum Johan sigur, prógvar ein stutt vitjan á bedingini ein vakran dag í farna mánaði.

Uppi á sjálvari sleipistøðini stóðu tveir bátar og við bryggjuna lá ein annar. Allir hava teir tørv á nøkrum avtænastunum, sum arbeiðsfólkið hevur at bjóða.

Teir átaka sær alt arbeiði innan jarn, træ og glastrevju, og ynskja haraftrat at vera ein álítandi partnari hjá føroysku fiskivinnuni.

– Her er nóg mikið at gera. Mesta arbeiðið sum vit gera eru kortini umvælingar.

– Og tað vísir seg tíbetur soleiðis, at tað altíð eru skip og bátar, sum hava tørv á tí, sigur Johan við Sosialin.

Í løtuni eru sjey mans til arbeiðis. Hetta vísir seg at vera sera hóskandi til arbeiðsgongdina og tørvin á sleipistøðini.

## Bátar og bátabrýr

Tveir av bátunum, sum vóru í hondunum á arbeiðsmonnunum henda dagin, skuldu skifta motorin út. Annar teirra stóð á bedingini og hin lá við bryggju.

Ein stuttleikabátur var eisini tikin upp. Hann hevði tørv á ymiskum umvælingum, millum annað mátti stevnirørið har afturi skiftast út, tí tað var brotið.

Hinvegin so kann ein staðfesta, at talið av skipum á Strondum hevur verið minkandi tey seinnu árini.

Hetta hevur sum vera man eisini havt ávirkan á virksemið hjá Andersen Beding.

Henda dagin vit vitjaðu á bedingini vóru teir eisini í ferð við eitt heilt annað arbeiði, ið ikki beinleiðis hevur við skip og bátar at gera.



*- Vit átaka okkum alt arbeiði innan jarn, træ og glastrevju, sigur Johan*

*Mynd: Høgni Thomsen*

Sjóvar kommuna ætlar at geva smábátunum betri umstøður til atløgu, og hava tí bílagt sær fleiri bátabrúgvar.

Henda dagin sóust menn standa og sveisa nøkur hongsl á hesar, áðrenn tær verða lagdar út.